FYLGISKJAL 8

LM-064/2020

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra: Elin Hentze <elin@mix.fo>
Sendt: 30. juli 2020 22:24
Til: Jákup Andrias Kristiansen; Almannamálaráðið
Emne: SV: Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn

Góðan dag,

Her eru viðmerkingar frá áhugafelagnum Búgva til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn:

Vit í **áhugafelagnum Búgva** meina, at tað er sera gott, at **landsstýriskvinnan í bústaðarmálum** hevur ætlanir um at **betra um bústaðarmøguleikarnar** í Føroyum við hesum **uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn**. Tó kann enn meiri gerast enn uppskotið leggur upp til, tí hóast hesar ætlanir hjá landsstýriskvinnuni í bústaðarmálum, so er enn langt á mál, áðrenn bústaðarmøguleikar verða til allar føroyingar, sum ynskja at búgva í sínum heimlandi Føroyum.

Hetta svarið hjá okkum í áhugafelagnum Búgva tekur eisini støði í Ólavsøkurøðuni hjá Løgmanni, ið vit síggja tekur støði í uppskotinum hjá landsstýriskvinnuni í bústaðarmálum. Áhugafelagið Búgva meinar at:

*Tað er gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan ynskja **betri** og **fjølbroyttari bústaðarmøguleikar** til allar føroyingar. Tað er neyðugt, tí allir borgarar hvørki ynskja ella hava møguleika fyri at búgva í sama bústaðarformi ella bústaðarøki. Og bústaðartørvurin broytist eisini á lívsleiðini.

*Tað er gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan ætla, at tað **almenna** og tað **privata** skulu loysa leigubústaðartørvin í felag. Tó má ætlaða javnsetingin av tí almenna og tí privata ikki enda við, at bústaðirnir hjá báðum pørtum gerast dýrari! Ein stór orsøk til, at bústaðarmøguleikar ikki eru til allar føroyingar, er, at bústaðirnir eru alt ov dýrir - bæði teir, sum eru til keyps, og teir, sum eru til leigu. Tí er alneyðugt, at almennu leigubústaðirnir ikki hava avkastkrav og ikki noyðast at kappast við tað privata. Tað er neyðugt, at almennu leigubústaðirnir eru so bíligir, sum yvir høvur gjørligt, kring alt landið, bæði á smáplássunum og í teimum størru býunum – eisini í Havnini. Tað er eisini avgjørt neyðugt, at leigubýlisstuðul verður settur í verk, so tær familjurnar, sum ikki hava ráð at gjalda fulla leigu í eitt tíðarskeið, fáa hjálp til tak yvir høvdið. Vit í áhugafelagnum Búgva meta, at tað er gott pláss fyri privatum leigubústøðum eisini, hóast almennu leigubústaðirnir ikki hava sama avkastkrav sum teir privatu ❤

*Tað er gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan eggja **privatu vinnuni** at gera fleiri íløgur í bústaðarmarknaðin – bæði á leigu- og eigaramarknaðinum. Serliga er tørvur á fleiri alternativum eigarabústøðum, ið ikki eru so stórir og dýrir, sum sethúsini á verandi bústaðarmarknaðinum. Tað er tørvur á fleiri íbúðum, smáhúsum, herundir íbúðarbygningum og smáhúsabýlingum. Eisini búformum, sum eru skipaðir við felags hølum og fasilitetum.

*Tað er eisini gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan vilja, at **felagið Bústaðir** framvegis skal hava ein týðandi leiklut á bústaðarmarknaðinum. Spurningurin er tó, um 200 milliónir er nóg mikið at byggja bústaðir fyri bæði til fólk við serligum tørvi, nýtt barnaheim, lestrarbústaðir og vardar bústaðir! Tað er sera ósannlíkt! Tað er gott, at 100 milliónir í uppskotinum eru settar av til vanligar leigubústaðir á smáplássunum, so fólk fáa møguleika at búgva til leigu kring alt landið. Tó fer peningur heilt víst at resta í har eisini! Heilt víst! Og tað er heilt greitt, at 100 milliónir til vanligar leigubústaðir á størru plássunum, herundir í Tórshavn, ikki røkkur langt! Als ikki! So hesa upphædd verða landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og

samgongan noydd til at hækka beinan vegin! Vit minna á, at felagið Bústaðir hevur yvir 2.000 fólk á bíðilista hjá sær, harav meginparturin ynskir, og má, búgva í Høvuðsstaðnum.

*Tað er sera gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan leggja upp til Alment-Privat-Samstarv, og heita á **pensjónsfeløg**, **fakfeløg**, **bankar**, **privat feløg** og **felagið Bústaðir** um at finna saman í felag og fíggja bústaðarverkætlanir. Tó eigur samgongan avgjørt eisini at geva kommununum heimild til at byggja bústaðir til allar aldurs- og samfelagsbólkar, so kommunurnar kunnu verða við til at lyfta hesa samfelagsábyrgd eisini.

*Tað er eisini sera gott, at landsstýriskvinnan í bústaðarmálum og samgongan skjóta upp, at tað verður settur á stovn ein ráðgevandi instansur at ráðgeva privatum og vinnuni í bústaðarmálum. Sera gott!

At enda fara vit í áhugafelagnum Búgva at ynskja tykkum sera góða eydnu við at betra um bústaðarmøguleikarnar í Føroyum, so allir føroyingar, sum ynskja tað, fáa møguleika at búgva í sínum heimlandi.

Takk fyri ❤

Vinarliga

Elin Hentze
Umboð fyri áhugafelagið Búgva
Tlf. 280027
elin@mix.fo

Sendt fra Mail til Windows 10

Fra: Jákup Andrias Kristiansen
Sendt: 2. juli 2020 15:23
Til: jed@betri.fo; liv@liv.fo; pensjon@betri.fo; industry@industry.fo; megd@megd.fo; elin@mix.fo; bustadir@bustadir.fo; AV Almannaverkið; Heilsumálaráðið; Journalin hjá LMS; VMR-Journal; Mentamálaráðið; Fiskimálaráðið Journal; Fíggjarmálaráðið
Cc: Eyðun Mohr Hansen; Marjun Magnussen
Emne: Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn

Góðan dag

Hjálagt verður sent tykkum til ummælis:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Ráðgeving og heimild at fíggja bústaðabygging), og
- javntekstur

Freistin at koma við viðmerkingum er hósdagin 30. juli 2020. Viðmerkingarnar skulu sendast til: amr@amr.fo

Vinaliga/Sincerely

Jákup Andrias Kristiansen
Fulltrúi/Head of section

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon +298 734059
jakup.andrias.kristiansen@amr.fo • www.amr.fo